www.oljan.fo

Jan Müller 28 - 08 - 2012

Ovasti Statoilstjórin - Gleði meg at koma til Føroya

Tað var ein fáorðaður men jaligur og brosandi Helge Lund, sum oljan.fo hitti eftir orkutoppfundin í Stavanger mánadagin. Eftir ein sera gevandi og góðan fund um framtíðar olju- og samfelagsspurningar saman við ríkisleiðarum og oljustjórum úr ymsum londum, teirra millum eisini Føroyum, møttust Kaj Leo Johannessen, løgmaður, Johan Dahl, landsstýrismaður í oljumálum, Rúni M. Hansen, leiðari fyri arktisku deildina hjá Statoil, Petur Joensen, stjóri á Jarðfeingi og Helge Lund, samtaksstjóri hjá Statoil fyri m.a. at umrøða boringina á føroyska landgrunninum. Helge Lund upplýsti, at boringin gongur sum ætlað og stórur spenningur er hjá Statoil, um tað fer at eydnast hesaferð at raka við olju ella gass í Føroyum. Tað eru seks ár síðani, at Statoil seinast boraði í Føroyum. Vit vita, at hetta er eitt øki við stórum váða, men vit síggja eisini møguleikar í Føroyum. Helge Lund kundi ikki annað enn vera í góðum hýri henda dagin, tí kunngjørt varð, at Statoil aftur hevði gjørt eitt stórt oljufund í Norðsjónum. Hetta er enn eitt fund í eini rød av olju- og gassfundum, sum felagið hevur gjørt ymsa staðni í heiminum seinastu 18 mánaðirnar. Nú vónar hann, at Føroyar gerast partur av sigursferðini hjá Statoil. Brugdan 2 brunnurin er tann brunnurin, sum Statoil í løtuni setir sítt álit á, tó at eingin enn kann siga nakað við vissu, um borurin rakar við kolvetni í undirgrundini komandi vikurnar. Eg havi fleiri ferðir roynt at finna pláss í kallendaranum at vitja Føroyar, og nú má tað skjótt blíva til veruleika, sigur tann altíð brosandi oljustjórin við øllum føroysku umboðunum við sína lið. Nær Helge Lund fer at leggja leiðina til Føroya er enn óvist, men skuldi Statoil rakt við kolvetni í síni boring í heyst, so vildi tað ikki verið óhugsandi, at Statoilstjórin kemur til Føroya tá. Tað vil vera eitt vegamót bæði fyri Føroyar og fyri Statoil. Myndir Kaj Leo Johannessen, løgmaður, Johan Dahl, landsstýrismaður í oljumálum og Rúni M. Hansen, leiðari fyri arktisku deildina